# STEINTÓR ER FARIN Á GULLLAKSAVEIÐU

**GULLLAKSUR Tá Eysturbúgvin herfyri breyt motorin, meðan teir vóru á gulllaksaveiði saman við Vesturbúgvanum, misti vestmannatrolarin samstundis sín makkara í bestu gulllaksatíð. Nú hevur eydnast at finna ein makkara, og skipini eru farin á fyrsta túrin**

Vilmund Jacobsen

Tað var sera óheppið hjá sandoyartrolaranum og tess manning, at skipið skuldi bróta motorin mitt í bestu gulllaksavertíð.

Men tað er ikki alt, tú ert harri yvir, og soleiðis kann tað ganga, tá tað gongur illa.

Herfyri breyt Eysturbúgvin motorin, meðan teir vóru á gulllaksaveiði saman við Vesturbúgvanum úr Vestmanna.

Jóan Petur í Soylu, skipari á Eysturbúgvanum, segði í samrøðu við Sosialin, at skaðin, sum motorurin á Eysturbúgvanum fekk, er so umfatandi, at neyðugt er við nýggjum motori.

Og at skifta motor er ikki bara sum at siga tað.

Jóan Petur í Soylu segði, at tað fer at taka umleið hálvan triðja mánaða, áðrenn Eysturbúgvin verður klárur at loysa aftur, og tá er gulllaksavertíðin av.

**Nýggjur makkari**

Teir, sum eiga Vesturbúgvan, hava nú funnið sær ein nýggjan makkara til restina av hesi gulllaksavertíðini.



Skipið, sum nú hevur fingið møguleikan at fara á gulllaksaveiði saman við Vesturbúgvanum, er djúpvatnstrolarin Steintór, sum er heimahoyrandi í Hvalba.

Vesturbúgvin og Steintór fóru fyrsta túrin á gulllaksaveiði í vikuskiftinum.

Tað eru seks skip, sum hava loyvi at veiða gulllaks í summarhálvuni. Eins og í fjør, hevur veiðan verið góð í ár, og tá Eysturbúgvin breyt motorin, høvdu teir saman við Vesturbúgvanum gjørt tilsamans níggju túrar við fullari last.

Meðan skaðin á motorin hjá Eysturbúgvanum kemur dátt við hjá teimum 10 monnunum, sum eru knýttir at skipinum, kemur møguleikin hjá Steintóri at veiða gulllaks ivaleyst væl við, nú veiðan hevur verið so góð.

*vilmund@sosialurin.fo*

**TROLARI**

*Djúpvatnstrolarin Steintór er nú farin á gulllaksaveiði saman við Vesturbúgvanum, sum misti makkaran, tá motorurin hjá Eysturbúgvanum brotnaði herfyri*

**» teir, sum eiga Vesturbúgvan, hava nú funnið sær ein nýggjan makkara til restina av hesi gulllaksavertíðini**

# Royna politiskt at mýkja makrelmálið

**MAKRELUR Eftir landsstýrisfund í morgun er greitt, at Føroyar skulu gera enn eina roynd at semjast í spurninginum um býtið av felags kvotuni av makreli fyri 2010, áðrenn Føroyar fara at áseta sær eginkvotu**



*Tað er ikki so lætt at vera Jacob Vestergaard í hesum døgum, nú spurningurin um føroysku makrelveiðina fyri 2010 skal avgreiðast – helst skjótast gjørligt*

Vilmund Jacobsen

Leingi hevur ligið í luftini, at Føroyar fara at áseta sær eginkvotu fyri makrelveiði í 2010. Orsøkin er, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, ikki er nøgdur við, at Føroyar í býtinum av makrelinum fáa minni enn 5% av eini heildarkvotu upp á 570.000 tons. Saman við Noreg og ES eru Føroyar at rokna sum strandaland í býtinum av felagskvotuni av makreli, meðan Ísland, sum higartil ikki hevur verið partur av hesi avtalu, í fjør fiskaði umleið 130.000 tons av makreli í íslendskum sjógvi.

Noreg og ES kanna sær meginpartin av felagskvotuni, og hetta er hvørki politiski myndugleikin í Føroyum, ei heldur pelagiska vinnan í Føroyum, nøgd við.

Men ósemja er um, hvussu Føroyar kunnu røkka einum betri býtisparti.

Tá seinasti samráðingarfundur var millum Føroyar, Noreg og ES í London herfyri, vóru hini londini ikki sinnaði at lata Føroyum ein størri kvotupart, tó at bæði havfrøði og vinna nú vita, at makrelur í størri mun enn áður ferðast og gýtir í føroyskum sjógvi.

Á landsstýrisfundi í morgun var semja um, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum skal gera enn eina roynd at mýkja støðuna við at venda sær beinleiðis til fiskimálaráðharrarnar í Noreg og ES.

Semja er soleiðis um at gera hesa roynd fyri at vita, um Føroyar kunnu røkka einum frægari kvotupart við at taka málið upp á politiskt stig.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, sigur, at tíðin arbeiðir ímóti Føroyum í hesum máli, tí besta tíðin til makrelveiði í føroyskum sjógvi er í juli og august.

Landsstýrismaðurin er vitandi um, at fara Føroyar at áseta sær eginkvotu, sleppa føroysk skip ikki at fiska makrel í norskum sjógvi, ei heldur í ES-sjógvi, og tí er best, um ein føroysk áseting fyri 2010 ikki dregur alt ov langt út.

Næstu dagarnir fara at vísa, hvussu leikur fer í makrel-málinum.

*vilmund@sosialurin.fo*